# Hoyringsskriv til fundir 22. og 23. september

Niðanfyri eru høvuðsniðurstøðurnar í frágreiðingini frá fiskivinnunýskipanarbólkinum, sum varð settur 21. januar 2016. Her er talan um høvuðsniðurstøður, og komið verður ikki inn á allar tættir í arbeiðssetninginum í hesum hoyringsskrivi.

Á hoyringsfundinum fáa tit høvi til at viðgera hesar niðurstøður umframt at koma við tykkara sjónarmiðum um ætlaðu fiskivinnunýskipanina. Viðmerkingar og sjónarmið tykkara koma at síggjast aftur í endaligu frágreiðingini.

## 1 Burðardygd og stovnsrøkt

Sambært arbeiðssetningunum skal nevndin gera tilmæli um reglur/skipanir um, hvussu lívfrøðilig ráðgeving um stovnsrøkt verður ment og fylgd fyri allar fiskastovnar og allan fiskiskap, soleiðis at stovnarnir kunnu endurnýggja seg og kasta mest møguligt av sær. Nevndin skal eisini gera uppskot um, hvussu tryggjast kunnu eftirlitsskipanir, hagtalsskipanir og skjalfestingar í fiskivinnuni.

Nevndin mælir til:

- at stovnsmeting verður gjørd av øllum vinnuligum fiskasløgum í føroyskum sjógvi, har úrslit um stovnsstødd og veiðitrýst verða funnin. Umsitingin av hesum fiskasløgum verður grundað á veiðireglur og hugtakið um størstu, varandi veiðu (MSY). Sambært hesum skal veiðitrýstið setast soleiðis, at fiskastovnarnir geva størstu, varandi veiðu yvir eitt langt tíðarskeið, og har stovnarnir halda seg yvir eina minstustødd, sum er ásett fyri hvønn stovn sær. Ein endurbyggingarregla er eisini við í hesi veiðireglu, soleiðis at um stovnarnir fara undir áðurnevndu minstustødd, verður veiðitrýstið minkað samsvarandi fyri at geva stovninum møguleika at vaksa seg upp aftur. Tey fiskasløg, sum lítið er til av, og sum bert eru fingin sum hjáveiða, verða umsitin á ein einfaldari hátt, til dømis við hjáveiðireglum.
- at havrannsóknir og gransking av fiskastovnum og umhvørvi teirra verða uppraðfestar. Hetta er fyritreyt fyri at menna lívfrøðiliga ráðgeving um stovnsrøkt og fyri at røkka politiskt setta málinum um, at Føroyar skulu vera undangonguland at umsita allar fiskastovnar burðardygt.
- at hagtalsskipanir við øllum viðkomandi dátum frá fiskiskapinum verða støðugt mentar og talgildar, bæði fyri at savna og skráseta og fyri at gera skrásettu upplýsingarnar lætt og skjótt atkomuligar hjá teimum, ið hava brúk fyri teimum.
- at endurskoða verandi fráboðanarskipanir við tí endamáli at fáa neyvari hagtalstilfar til vega um fiskiskapin og um útbreiðslu av fiski (íroknað smáfiski) á innaru leiðunum. Mælt verður til, at allir bátar, sum avreiða, skulu lata inn fráboðanir.

## 2 At skipa fiskiskapin

Sambært arbeiðssetninginum skal nevndin viðgera og gera uppskot um, hvør fiskivinnuskipan hevur bestu regulering/sjálvregulering í mun til stovnsrøktina. Harumframt

skal nevndin gera tilmæli/uppskot um, hvussu vit umsita stovnsrøktina best. Nevndin skal herundir viðgera, um umsitingin av rættindum, góðkenningum o.a. skal leggjast til óheftan stovn. Nevndin skal eisini gera tilmæli um, hvussu veiðisetningur, umsitingarætlanir og endurbyggingarætlanir fyri fiskastovnar kunnu kjølfestast og leggjast í langtíðarsemjur.

Føroyski fiskiflotin virkar undir ymiskum reguleringsskipanum. Sum tað fyrsta kunnu fiskifør undir føroyskum flaggi ikki fara til vinnuligan fiskiskap uttan at hava loyvi frá myndugleikunum. Harnæst er sjálvur fiskiskapurin avmarkaður við fiskidøgum, loyvistali, hámarksveiðu, kvotum, hjáveiðireglum, økisfriðingum og øðrum tekniskum reguleringum. Hetta er grundvøllurin í verandi skipan, sum skal stuðla upp undir, at vit gagnnýta fiskiríkidømi okkara burðardygt, bæði lívfrøðiliga og búskaparliga.

Nevndin metir, at tað serliga er í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi, at tørvur er á ábótum. Hetta er eisini tann fiskiskapur hjá føroyskum fiskiførum, sum vit sjálvi hava ræði á og einsamøll hava ábyrgd av at skipa.

Skipanin í fiskiskapinum eftir høvuðsbotnfiskasløgunum í føroyskum sjógvi hevur verið nøkulunda støðug seinastu 20 árini. Onkrar stillingar eru gjørdar ávegis, eitt nú er samlaða fiskidagatalið skorið, og onkrar friðingar eru komnar afturat, men grundvøllurin í skipanini er at kalla óbroyttur.

Sama kann ikki sigast um gongdina í fiskiskapinum. Veiðan eftir serliga toski, hýsu og upsa í føroyskum sjógvi er minkað nógv, og rakstrarúrslitini hjá flestu skipabólkum eru vorðin tilsvarandi verri. Náttúran ger eisini sítt, at minni er til. Tó metir ein meiriluti í nevndini, at nógv í óhepnu gongdini er ein avleiðing av vantandi stovnsrøkt og stýring av fiskiskapinum. Hetta hevur bæði við eginleikarnar hjá skipanini og við umsitingina av henni at gera.

Í skipanini av fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi verður mælt til:

- at ein skipan við hámarksveiðu og kvotum frameftir verður høvuðsamboðið í øllum fiskiskapi. Høvuðsmálið er, at allur fiskiskapur verður kvoteraður, eisini tað, sum í dag ikki er beinleiðis undir fiskidagaskipanini. Meirilutin í nevndini metir ikki, at fiskidagaskipanin saman við øðrum átøkum og reguleringum hevur megnað at tryggja góða stovnsrøkt og stuðla upp undir lívfrøðiliga burðardyggan fiskiskap. Meirilutin í nevndini metir eisini, at ein fiskidagaskipan er ov stirvin til at birta undir tillagingar og effektiviseringar í flotanum og harvið ein búskaparliga burðardyggan fiskiskap.

  Ein vansi við eini kvotuskipan í mun til eina fiskidagaskipan er vandin fyri, at fiskur verður blakaður út ella verður landaður undir følskum heiti fyri at halda eina ásetta kvotu. Eisini er vandin fyri ‘highgrading’ størri í eini kvotuskipan, t.e. at bert tann veiða, ið gevur besta avreiðingarprís, verður tikin til lands.

  Meirilutin í nevndini metir kortini, at tað við ymiskum skipanum ber til at tálma útblaking. Hetta kann eitt nú gerast við at áseta, at øll veiða (ella øll veiða av ávísum fiskasløgum) skal førast til lands. Ein kann eisini hugsa sær, at skip fáa eitt endurgjald, ið eggjar til, at ótilætlað veiða verður førd til lands, tó so at skipini ikki skulu hava vinning av hesum. Skipanin við stongdum leiðum ella bráðfeingis veiðibanni á ávísum leiðum er

við til at stýra fiskiskapinum burtur frá leiðum, har nógv er til av fiski, ið sannlíkt verður blakaður út aftur.

Sæð úr einum stovnsrøktarsjónarmiði er umráðandi, at øll veiða verður førd til lands og skrásett. Málið eigur tí at vera, at regluverkið eggjar til, at sum mest av ótilætlaðari veiðu kemur til lands, og at gamla bannið ímóti at blaka veiðu út aftur verður hildið.

Meirilutin av nevndini metir samanumtikið, at fyrimunirnir við eini kvotuskipan sum frá líður fara at gerast sjónligari enn vansarnir.

- at allur fiskiskapur eftir botnfiski í føroyskum sjógvi verður skipaður í umsitingarætlanir við veiðireglu, sum setir karmarnar fyri áseting av hámarksveiðu yvir longri áramál. Ein umsitingarætlan er ein politisk langtíðarsemja at fyrisita fiskastovnar. Í umsitingarætlanini verða mál sett fyri at tryggja stovnsrøkt og burðardygga gagnnýtslu, eins og ásett verður, hvussu málini verða rokkin. Bulurin í umsitingarætlanini er ein veiðiregla, sum sigur, hvussu stóran part, vit kunnu taka úr stovninum um árið. Ein umsitingætlan verður ikki sett ístaðin fyri verandi reguleringar í fiskiskapinum, men er mest eitt amboð, ið kann brúkast at seta í verk fiskiveiðipolitisk mál. Stovnsrøkt og veiðistýring verður sett í øðrvísi karmar, har dentur er lagdur á langtíðarhugsan, tá hámarksveiða og aðrar reguleringar verða ásettar. Endamálið við umsitingarætlanum er eisini at tryggja vinnuni ávísan stabilitet, so at ikki ov stór sveiggj eru í árligu fiskimøguleikunum, og at vinnan við hesum kennir treytirnar og karmarnar eitt rímiligt tíðarskeið frameftir. Hetta kann gerast, við at hámarksveiðan ikki verður broytt meira enn t.d. eitt ávíst prosent, sammett við undanfarna fiskiár.

- at tað frameftir er landsstýrismaðurin, sum við heimild í lógini ásetir hámarksveiðu í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi. Nevndin metir, at ein tílík avgerð eigur at takast fyrisitingarliga innan fyri karmarnar og treytirnar í eini umsitingarætlan, sum er kjølfest politiskt.

*Bólkabýtið*
Viðvíkjandi bólkum mælir meirilutin í nevndini til, at í eini framtíðarskipan fyri útluting og býtið av rættindinum verða bólkarnir so fáir sum gjørligt. Hetta fær serliga týdning, tá ein uppboðssøla av veiðirættindum verður sett í verk, tí ein fortreyt fyri eini væleydnaðari uppboðssølu er, at kapping er á uppboðssølumarknaðinum. Um eitt stórt tal av bólkum skal varðveitast, verður mest sannlíkt neyðugt at skipa fyri ymiskum uppboðssølum í ymiskum bólkum, og tá verður kappingin meira avmarkað á uppboðssølumarknaðinum, og líkindini gerast størri fyri, at uppboðssølan ikki eydnast væl.

## 3 Marknaðargrundað útluting

Sambært arbeiðssetninginum skal farast burtur frá eini skipan, har útlutingin av fiskirættindunum verður grundað á lógarviðgerð í Løgtinginum ella fyriskipan, ið landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur ásett. Útlutingin skal ístaðin vera marknaðargrundað. Uppskotini kunnu sambært arbeiðssetninginum vera uppboðssøla ella aðrar útbjóðingarskipanir frá tí almenna til privat, og sostatt skal talan vera um almenna

útbjóðing av fiskirættindum. Í arbeiðssetninginum verður eisini sagt, at rættindini eru tíðaravmarkað og kunnu ikki geva tí privata ognarrætt til tilfeingið.

Nevndin skal viðgera og gera tilmæli um, hvussu marknaðurin fyri fiskirættindini best kann skipast, og hvørjar treytir skulu setast til teirra, ið bjóða seg fram. Í arbeiðssetninginum er harumframt ásett, at marknaðurin fyri fiskirættindi skal vera ein marknaður millum tað almenna øðrumegin og tað privata hinumegin.

Sostatt er staðfest í arbeiðssetninginum, at talan skal vera um eina marknaðargrundaða skipan. Harumframt hevur nevndin á fundi við landsstýrismannin fingið staðfest, at øll fiskirættindi skulu seljast um uppboðssølu. Eisini hevur landsstýrismaðurin gjørt greitt, at skipanir við søguligum rættindum, tilfeingisgjøldum ella 'beauty contest' ikki eru í samsvari við arbeiðssetningin. Tilmælini byggja tí á ta fyritreyt, at uppboðssøla skal vera av øllum rættindum. Nevndin hevur tí ikki viðgjørt spurningin, *um* uppboðssøla skal vera ella ikki. Við støði í hesum politiska ynski verða tveir útlutingarleistir lýstir, sum í besta mun liva upp til tær treytir, sum verða settar í arbeiðssetninginum. Hesir leistir verða báðir lýstir niðanfyri.

Nevndin hevur umrøtt, at ein uppboðssøla av øllum fiskirættindum í senn hevur við sær stórar váðar og ótryggleikar fyri føroysku fiskivinnuna. Tí verður mælt til eina skiftistíð, sum ger, at tað bert er ein avmarkaður partur av samlaðu fiskirættindunum, ið verða boðin út hvørt ár. Eisini eru stórar avbjóðingar í at fáa eina uppboðssølu at virka eftir ætlan, m.a. tí at ymiskar avmarkingar verða settar, og tí at talið av aktørum, sum kunnu luttaka, er avmarkað. Nevndin veit ikki um nakað land, sum lutar øll síni fiskirættindi út á uppboðssølu. Tí er trupult hjá nevndini at meta um avleiðingarnar av at verkseta eina sovorðna skipan. Nevndin er eisini í iva um, hvussu væl ein uppboðssøla kann tryggja, at aðalendamálini í arbeiðssetninginum kunnu røkkast. Í hesum sambandi hevur nevndin eisini umrøtt kombinatiónsleistir, har ein partur verður seldur á uppboði, og ein partur verður lutaður út eftir søguligum rættindum. Hesin leistur er tó ikki í samsvari við nágreinaða arbeiðssetningin og varð tí ikki viðgjørdur nærri.

Nevndin metir tað hava stóran týdning, at uppboðssølan av fiskirættindum ikki darvar íløguhuginum og virkseminum annars í fiskivinnuni. Nevndin mælir til, at uppboðssølan verður løgd soleiðis til rættis, at hon hevur fyrilit fyri teimum váðum, sum liggja í at reka fiskivinnuvirksemi í tann mun, hetta letur seg gera. Ein møguleiki her er at útluta loyvir við langari gildistíð (t.d. 10 ár). Hetta er nærri lýst niðanfyri (leistur 1). Somuleiðis ber til at luta út 1-árs loyvir og geva vinnufyritøkum ein forkeypsrætt til ávísan prosentpart av kvotunum, sum fyritøkan hevði ræði á árið frammanundan. Eitt dømi um ein tílíkan útlutingarleist er lýstur niðanfyri (leistur 2).

Nevndin metir tað somuleiðis hava týdning, at fyritøkur, sum luttaka á uppboðssøluni, hava javnar kappingartreytir. Fyri í størri mun at javnseta fyritøkur við ymiskari fíggjarorku, verður tí mælt til, antin at fyritøkur einans rinda part av uppboðssølugjaldinum, áðrenn fiskað verður (leistur 1), ella einans rinda fyri 1 ár í senn (leistur 2). Mælt verður somuleiðis frá at lóggeva á ein tílíkan hátt, at starvsfólk í fiskivinnuni ikki kunnu rinda partar av uppboðssølugjaldinum. Hetta eigur at vera upp til vinnu og starvsfólk at gera av ígjøgnum arbeiðsmarknaðarsamráðingar.

Nevndin mælir til, at fiskirættindi eru umsetilig á einum almennum marknaði. Hetta hevur við sær størri gjøgnumskygni við kvotuhandlum, og at allar fyritøkur kunnu bjóða upp á kvotur. Í arbeiðssetninginum verður ásett, at marknaðarskipanin skal tryggja, "at tað ikki verður ein privatur undirmarknaður, har rættindi verða seld frá privatum til privatan". Nevndin metir tað vera óheppið fyri skipanina, um fiskirættindi verða fullkomiliga óumsetilig í framtíðini, tí tað samsvarar ikki við tað at hava eina marknaðargrundaða fiskivinnuskipan. Umsetiligheit tryggjar tillagingar í fiskivinnuni og er sostatt avgerandi fyri effektivitetin í vinnuni. Hetta er serliga týdningarmikið við rættindum við longri gildistíð. Ásetingar um at taka burtur alla umsetiligheit sampakka ikki við ynskið um at veita vinnuni betri møguleikar til at skapa avkast.

Spurningurin er eisini, um tað ber til at steðga allari umsetiligheit og spekulatión við lóg, tí at fyritøkur vilja nýta aðrar hættir at náa málinum við umsetiligheit. Eitt nú kunnu tær selja partapeningin í feløgunum við rættindum ella á annan hátt broyta samansetingina av eigarum. Harumframt kunnu fyritøkur brúka leigu og/ella umbýti av skipum til at umseta fiskirættindini við, um tað í loyvistíðarskeiðinum vísir seg at vera meira skynsamt. Tí verður torført at forða fyri umsetiligheit.

Í mun til neyvu tilrættisleggingina av uppboðssølunum, herundir í hvønn mun opin og afturlatin uppboðssøluháttur skal nýtast, mælir nevndin til at seta serfrøðingar í uppboðssølum til at gera neyvari greiningar og uppskot. Tilrættisleggingin av uppboðssølunum hevur stóran týdning, tá kappingin er avmarkað á uppboðssølunum, og stundir eiga at vera til at gera neyvari lýsingar av hesi avbjóðing og møguligum atlitum, sum ein kann taka hesum viðvíkjandi.

Nevndin mælir til at hava eina skiftistíð, soleiðis at verandi fyritøkur fáa stundir at tillaga seg. Dømir um skiftistíð eru í leistunum niðanfyri.

*Leistur 1: Stutttíðar- og langtíðarrættindi*

Í hesum uppskoti er talan um uppboðssølu av bæði stutttíðar- og langtíðarrættindum. Mett verður, at ein samanseting av loyvum við ymiskum longdum kann nøkta ymiskar tørvir í vinnuni. Størsti parturin av loyvunum verður tó long ella miðallong loyvir í hesum uppskoti, og her verður dentur lagdur á at veita tryggleika til fyritøkur í vinnuni, og á henda hátt eisini at eggja til skynsamar íløgur. Stutttíðarloyvir eru hinvegin við til at tryggja, at ein størri nøgd altíð er tøk á uppboðsøluni, og kunnu tí á henda hátt eisini vera við til at veita trygd til fyritøkurnar.

Trý ymisk sløg av loyvum eru í hesi skipan: 1, 5 og 10 ára loyvir. Talan er um <u>uppskot</u> til longdir heldur enn avgjørd tilmælir, og nevndin mælir her til, at politiska skipanin í samráði við vinnuna ger eina samanseting av ymiskum loyvum.

Sambært hesum uppskoti eru (eftir skiftistíðina) 50 prosent av loyvunum 10 ára loyvir, 40 prosent eru 5 ára loyvir og 10 prosent eru 1 ára loyvir (sí mynd 1). Skipað verður fyri uppboðssølu hvørt ár, har 23 prosent av samlaðu kvotuni fer á uppboðssølu, umframt at almennur marknaður verður skipaður av loyvunum fyri at tryggja umsetiligheit, eins og víst varð á omanfyri.

Meginparturin av gjaldinum fyri kvoturnar skal rindast eftir avreiðing, og gjaldið verður regulerað fyri sveiggj í miðal fiskaprísinum og møguliga eisini oljuprísi.

Í hesum dømi fáa verandi rættindahavarar í kalendaraárinum 2018 77% av teimum rættindum, ið hesir hava tann 31. desember 2017. Hini 23% av fiskirættindunum í 2018 verða boðin út í september 2017. Í 2019 fáa verandi eigarar 64% av teimum upprunaligu rættindunum o.s.fr.

*Mynd 1: Rættindaslag í prosent av heildarkvotunum (við skiftisskipan)*




Prísurin fyri eitt loyvi í skiftistíðini verður ásettur av teimum loyvum, sum verða seld á uppboðssøluni. Um verandi aktørar í skiftisskipanini velja at siga nei takk til loyvið, verður hetta eisini boðið út á uppboðssøluni.

*Leistur 2: Uppboðssøla við forkeypsrætti*

Hesin leisturin byggir á, at øll veiðirættindini skulu seljast fyri í mesta lagi 1 ár í senn. Hvørt ár verða 20% av flestu kvotunum seld á uppboðssølu, og aktørar, ið vóru virknir í vinnuni árið fyri, fáa ein forkeypsrætt til 80% av tí, sum teir fiskaðu árið fyri. Ein tílík skipan tryggjar stabilitet fyri verandi loyvishavarar og tryggjar somuleiðis, at nýggir aktørar eisini hava møguleika at sleppa inn á marknaðin.

Prísurin á veiðirættindunum, ið koma undir forkeypsrættin, verður miðalprísurin á tí fiskaslagnum, sum er selt á uppboðssøluni.

Rindast skal fyri loyvini, tá hesi verða keypt á uppboðssøluni, og ikki eftir avreiðing sum í undanfarna uppskoti. Hetta sama er galdandi fyri rættindi, sum fyritøkan keypir við forkeypsrætti.

*Mynd 2: Virðisminking av veiðirættinum*




Mynd 2 vísir virðið á veiðirættinum frá degi eitt í einum fiskiári. X-aksin eru dagar, og y-aksin lýsir, hvat fiskirættindini kunnu latast inn aftur fyri í mun til tað, tey blivu keypt fyri.

Henda skipan hevur trý endamál:

1. *Trygd fyri láni*

Serliga nýggir aktørar kunnu brúka hetta sum trygd hjá bankanum, tí fiskirættindini eru altíð 100% likvid minus niðurskriving fram til 15. november í hvørjum fiskiári. Bankin kann fáa trygd í rættindunum og hava ein einarætt seinasta mánaðin (tað økið er markerað við grønum), áðrenn ein kemur út í tíðarskeiðið, har ein bert fær peningin aftur, um keypari er til rættindini (tað økið er markerað við gulum). Sostatt skulu nýggir aktørar einans tryggja tað virðisminking yvir fyri fíggjarstovnunum, sum leypandi hendir gjøgnum árið.

2. *Tilskundan til at fáa alt fiskað*

At fiskirættindini missa virði leypandi gjøgnum árið, skuldi alt annað líka fingið aktørarnar til at hugsa seg um og lata inn aftur tann partin, ið teir ikki klára at fiska. Harvið skuldi verið sannlíkt, at øll kvotan kom til høldar á hvørjum ári.

3. *Ein neyðbremsa*

Um nú alt gongur ímóti, t.d. oljuprísurin veksur, og fiskaprísurin fellur, skal tað bera til at lata alt inn aftur, sum keypt er á uppboðssøluni. So verður alt selt av nýggjum, um ein kann vænta at fáa keypt rættindini aftur fyri minni kostnað. Hetta eigur at vera ein møguleiki fyri

at tryggja stabilitet í vinnuni, tí tað er avgerandi, at allir partar, sum luttaka í vinnuni, hava álit á skipanini. Men av tí at uppskot er um, at øll rættindini verða seld í trimum umførum: fyrst 40% í oktober/november árið fyri, so 30% mánaðarskiftið mars/apríl og restin mánaðarskiftið juni/juli, skuldi hetta tikið størsta vandan burtur, so at tørvurin at selja rættindini fyri at endurseta prísin skuldi ikki verið stórur.

# 4 Útlendskur kapitalur

Arbeiðssetningurin ásetir beinleiðis, at tilmælið skal byggja á ta fyritreyt, at útlendskur ognarskapur og avgerðarrættur í feløgum, sum reka føroyska fiskiveiði, verður burtur. Nevndin hevur tí ikki viðgjørt spurningin, *um* avmarkingar eiga at verða settar fyri útlendskum eigaraskapi í føroyskari fiskiveiði.

*Skiftisskipan fyri feløg, sum hava útlendskar eigarar*
Arbeiðssetningurin áleggur nevndini at gera uppskot um, hvussu verandi útlendskur ognarskapur og ræðisrættur kann taka seg úr vinnuni í eini skiftistíð. Skotbráið er stutt til 2018, tá veiðiloyvini fara úr gildi. Tí verður mett rætt, at verandi fyritøkur, sum partvíst hava útlendskar eigarar í samsvari við galdandi lóggávu, fáa eina skiftistíð at laga seg til nýggju umstøðurnar í vinnuni. Um talan er um munandi eginogn, kann verða trupult hjá føroysku eigarunum skjótt at keypa partin, ið útlendingar eiga, ella at finna nýggjar, føroyskar íleggjarar. Viðmerkjast kann, at fyri onkran kann talan vera um fleiri tíggjutals mió. kr., og fyri onnur kann talan vera um lutfalsliga lítlar upphæddir. Um skiftistíðin er ov long, kann tað merkja, at feløg við útlendskum eigarum fáa ein ov stóran fyrimun í kappingini at bjóða upp á rættindi at fiska. Um skiftistíðin er ov stutt, kann tað merkja, at feløgini við útlendskum eigarum vera fyri vanbýti, tí tað ikki er møguligt at halda áfram við virkseminum.

Nevndin mælir til, at feløg, sum hava útlendskar eigarar, fáa eina skiftistíð upp á 3 ár at laga seg til broyttu reglurnar. Feløgini fáa soleiðis 3 ár at keypa partin hjá útlendingum, finna nýggjar íleggjarar, ella at laga virksemið til broyttu treytirnar. Tá trý ár eru farin, frá tí at nýggj lóg er komin í gildi, kunnu feløg við útlendskum eigarum ikki longur bjóða á uppboðssølu og kunnu heldur ikki reka ella eiga fiskifør undir føroyskum flaggi.

*Hvør kann bjóða seg fram í føroyskari fiskiveiði?*
Sambært arbeiðssetninginum skal nevndin m.a. lýsa og gera uppskot um, hvussu tryggjast kann, at bert feløg, sum eru skrásett í Føroyum, sum rinda skatt í Føroyum, og sum hava eigarar, ið eru búsitandi og skattskyldigir í Føroyum, kunnu bjóða seg fram í føroyskari fiskiveiði.

Nevndin hevur tilmæli um, at tað ikki bert eru eigarar av fiskiførum, men ein og hvør, sum lýkur kravið um tilknýti til Føroya, sum kann bjóða á uppboðssøluni. Tí verður kravið um tilknýti til Føroya sett til teir persónar og tey feløg, sum bjóða á uppboðssøluni. Tey, sum bjóða á uppboðssølu, skulu kunna leiga sær før at fiska við. Hetta kann verða gjørt soleiðis, at tann, sum hevur vunnið boð á uppboðssøluni, leigar eitt fiskifar, sum hesin sjálvur rekur og fiskar við. Hetta kann eisini verða gjørt soleiðis, at tann, sum hevur vunnið boð á uppboðssøluni, ger avtalu við annan, sum eigur ella rekur eitt leigað fiskifar. Fyri at tryggja, at tað bert eru tey við neyðuga tilknýtinum til Føroya, sum reka føroyska fiskiveiði, má tilknýtiskravið tí eisini setast teimum, sum eiga leigaðu fiskiførini, og teimum, sum reka leigaðu fiskiførini.

*Hvussu verður kravið um tilknýti til Føroya ásett*
Lóg um vinnuligan fiskiskap ásetir fyri persónar, at teir skulu hava verið búsitandi í Føroyum í 2 ár og skulu vera fult skattskyldigir í Føroyum. Einki krav er um ríkisborgararætt, bert at persónur skal hava verið búsitandi í Føroyum í 2 ár og skal hava fulla skattskyldu í Føroyum. Eru treytirnar loknar, verður viðkomandi roknaður sum føroyingur í føroyskum fiskivinnuhøpi løgfrøðiliga sæð. Persónar, sum búgva uttanlands, kunnu tí ikki eiga fiskifør undir føroyskum flaggi. Tað kunnu hinvegin persónar, sum búsetast í Føroyum, eftir at teir hava búð her í 2 ár.

Nevndin mælir til, at persónar skulu hava verið skrásettir í fólkayvirlitinum í Føroyum í til samans 5 ár, umframt at teir skulu vera skrásettir í fólkayvirlitinum og fult skattskyldigir í Føroyum, tá teir gerast eigarar. Hetta er sama krav, sum er galdandi í alilógini.

Arbeiðssetningurin ásetir, at tilmælið skal byggja á ta fyritreyt, at útlendskur ognarskapur og avgerðarrættur í feløgum, sum reka føroyska fiskiveiði, verður burtur. Fyri feløg verður kravið um, at 2/3 av eigarunum skulu lúka kravið um tilknýti til Føroya tí broytt til, at allir eigarar skulu lúka kravið um tilknýti til Føroyar. Fyri feløg mælir nevndin til, at veruliga leiðslan, sum hetta er allýst í skattalóggávuni, skal vera í Føroyum. Hetta fyri at tryggja, at feløgini veruliga koma undir skatting í Føroyum. Harumframt mælir nevndin til, at ásetingin um at avmarka ábyrgdarlán úr útlondum verður varðveitt, umframt at forðað verður fyri slíkum útlendskum lánum, sum eru knýtt at yvirskotinum í føroysku feløgunum, slíkum lánum, har renturnar ella tað, sum skal rindast aftur, veldst um yvirskotið í feløgunum.

*Undangóðkenning*
Nevndin mælir til, at krav verður sett um undangóðkenning av teimum, sum skulu bjóða á uppboðssølu, so at ein tryggjar sær, at tað bert eru tey, sum lúka settur treytirnar fyri eigara-, avgerðar- og fíggjarviðurskiftum, ið kunnu bjóða á uppboðssølu. Mælt verður til at heimila landsstýrismanninum at áseta nærri reglur í kunngerð um undangóðkenningina. Sama fyritøka nýtist ikki at verða góðkend hvørja ferð, boð verður latið inn. Skipan kann verða sett í verk, har fyritøkur eitt nú verða undangóðkendar, áðrenn boð verður latið fyrstu ferð, og møguliga eftirfylgjandi við ávísum millumbilum, ella sum myndugleikin metir tað viðkomandi. Eisini kunnu treytir setast í kunngerð, at fyritøkur skulu lata inn upplýsingar, hvørja ferð ávísar broytingar fara fram, ella við jøvnum millumbilum. Hetta eru viðurskifti og mannagongdir, sum hóska seg best at áseta í kunngerð.

Tað verður ikki mett at vera neyðugt, at eigari ella leigari skulu góðkennast fyri at sleppa at bjóða á uppboðssølu. Nóg mikið er at góðkenna ognar- og leiguviðurskiftini, áðrenn farið verður til fiskiskap..

*Krav um, at fiskifør verða skrásett undir føroyskum flaggi*
Sum nevnt, verða tað sambært tilmælunum frá nevndini ikki bert eigarar av fiskiførum, sum kunnu bjóða upp á veiðirættindi á uppboðssølu. Tey, sum bjóða á uppboðssølu, kunnu leiga sær fiskifør at fiska við ella gera avtalu við annan, sum eigur ella rekur leigað fiskifar. Fyri ikki at undirgrava treytir, sum føroysk lóggáva setir til skip undir føroyskum flaggi, mælir nevndin til, at tað verður sett krav í fiskivinnulóggávuna, at skip, sum fiska við føroyskum rættindum, skulu verða skrásett í Føroyum. Tá kravt verður, at skipini skulu skrásetast í Føroyum, verða

allar viðkomandi reglur galdandi fyri skip, manning og veiðu, m.a. reglur um trygd á sjónum, um manning av skipum, um starvsviðurskifti o.a. hjá sjófólki og ásetingarnar sambært matvørulóggávuni.

Av tí at tað ikki bert eru eigarar av fiskiførum, sum kunnu bjóða upp á fiskimøguleikar á marknaðinum, verður møguligt at leiguskráseta fiskifør at nýta til fiskiskap. Sambært lóg um skráseting av skipum og kunngerð um leiguskráseting av skipum kann skip leiguskrásetast í Føroyum fyri eitt tíðarskeið upp til 5 ár. Tíðarskeiðið kann leingjast við upp til einum ári í senn. Treyt er, at leigarin er at meta sum føroyskur. Skip sum verða leiguskrásett í føroysku skipaskránni, skulu føra føroyskt flagg. Veðrættindi ella onnur rættindi kunnu ikki skrásetast í skipi, ið er leiguskrásett.

## 5 Kappingarreglur (anti-trust)

Arbeiðssetningurin ásetir, at nevndin skal viðgera og gera tilmæli um, hvussu stóran part av fiskirættindunum einstakir aktørar kunnu hava brúksrætt til (ásetingar um antitrust).

Atkomiligheit og kapping verða eisini viðgjørdar í høvuðsmálunum í arbeiðssetninginum, har eitt mál er, at vinnumøguleikar ikki savnast á fáum hondum, men at somu rættindi eru at bjóða seg fram at reka vinnu.

Kappingarreglur hava sum høvuðsendamál at forða fyritøkum í at misnýta eina ráðandi støðu. Tó kunnu eisini onnur endamál vera við tílíkum reglum. Eitt nú kann nevnast, at kappingarreglur kunna forða fyri, at einstakar fyritøkur gerast stórar í mun til støddina á føroyska búskapinum. Harumframt kann talan vera um eitt politiskt ynski um at varðveita fleiri fyritøkur á marknaðinum.

Nevndin metir tað hava týdning, at føroyski búskapurin ikki er ov bundin at einstøkum fyritøkum, og sostatt mælir nevndin til at seta í verk avmarkingar í mun til samlaðu kvoturnar í fiskivinnuni. Tílíkar reglur eru ikki inni í skipanini í dag. Nevndin mælir somuleiðis til, at kappingarreglur verða settar í mun til kvoturnar í ávísum fiskiskapi (og ikki t.d. veiðiloyvir ella fiskiloyvir, sum í núverandi reglum).

Nevndin hevur ikki ásett nakað ávíst prosenttal, tí mett verður, at tað er meira ein politiskur spurningur at áseta eitt tílíkt prosenttal. Nevndin kann ikki fakliga grundgeva fyri einum ávísum prosenttali heldur enn einum øðrum.

## 6 Virðisvøkstur

Sambært arbeiðssetninginum skal ítøkilig viðgerð og niðurstøða gerast um eitt nú hesar tættir og og hesi viðurskifti:

- at virki í Føroyum sleppa at rávøruni (atkomuligheit), til dømis um kravda uppboðssølu av rávøru,
- at øll rávøra skal um føroyskan kaikant,
- at øll hjávøra (livur, garnar, høvd, uggar, fráskurður o.a.) skal hagreiðast umborð ella førast til lands.

Nevndin hevur viðgjørt ymisk tiltøk, sum kunnu tryggja (a) at føroyskt fiskatilfeingi í størri mun verður virkað í Føroyum og (b) at størri partur av fiskatilfeinginum kemur til lands.

Nevndin metir tað hava týdning fyri virðisøking í føroysku fiskivinnuni, at vinnan fær møguleika at leggja sítt virksemi til rættis og eisini kann taka tørvin hjá marknaðinum við í hesa tilrættislegging. Sostatt mælir meirilutin í nevndini frá at seta í verk kravda uppboðssølu av veiddum fiski.

Við tí fyri eyga at fáa alt av fiskinum til lands, metir nevndin tað vera týdningarmikið, at farið verður undir eina tilgongd saman við vinnuni, har mett verður um, hvussu ásettu málini kunnu røkkast. Tíðarfreist eigur at verða sett fyri, nær málið skal vera rokkið.

Í mun til at fáa størri part av fiskinum til lands, metir nevndin tað somuleiðis vera avgerandi, at menning og gransking av matvøruframleiðslu verða raðfestar frammarlaga. Væntandi lønsemi er ein týðandi forðing í mun til at fáa ein størri part av fiskinum í land, og her kann gransking og menning hava ein avgerandi leiklut. Íslendski granskingarstovnurin Matís kann vera íblástur í mun til gransking í matvøruframleiðslu.

Nevndin metir, at reguleringin av vinnuni (og útlutingin av loyvunum) eisini hevur ein leiklut í mun til at tryggja meirvirking av fiskavørum. Vinnan eigur at fáa støðugar karmar, ið samstundis hava við sær marknaðarhugsan. Uttan ein ávísan tryggleika fyri (í øllum førum nøkrum) miðallongum og longum veiðirættindum er torført at tryggja, at vinnan ger neyðugar íløgur og mennir teir møguleikar, sum liggja í fiskatilfeinginum. Tryggleiki fyri loyvunum eggjar til, at ótroyttir møguleikar í føroysku fiskivinnuni koma undan kavi.

Í frágreiðingini verður somuleiðis víst á møguleikar fyri at tryggja, at fiskur verður virkaður í Føroyum, tó at ítøkilig tilmæli ikki verða gjørd um hetta. Eitt nú verða hesir møguleikar nevndir: (i) fiskur skal landast við høvdi (tó undantikið flakatrolarar), (ii) avsláttur í tilfeingisgjaldi, (iii) avreiðingargjald á útfluttan, óvirkaðan fisk og (iv) betri fíggingarmøguleikar fyri frystan fisk.